# Var ikki meiningin at hava fólkaatkvøðu í Vágum



*Bygdaráðslimir í Sørvági vóru eitt sindur ørkymlaðir. Frá vinstru eru tað Jógvan Páll Joensen, Jóhan F á Ørg, Erik Davidsen, varaborgarstjóri og Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri*

**Bygdaráðslimir í Sørvági skilja ikki hvussu tað ber til, at fólkaatkvøða verður í Miðvági og í Sandavági um kommunu-samanlegging**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bygdaráðslimir í Sørvági skilja ikki rættiliga, hvussu tað er enda við, at fólkaatkvøða nú verður í Miðvági og í Sandavági um at leggja kommunur saman.

Fòlkaatkvøðan í hesum báðum bygdunum skal vera samstundis sum løgtingsvalið er, tann 19. januar.

Málið hevur sín uppruna í einum fundi í felagskommununi í Vágum, har kommunusamanlegging varð umrøtt.

Men har var onki tosað um at hava fólkaatkvøðu. Tað, sum varð samtykt í felagskommununi, var einans at heita á kommunurnar um at vera við til at útvega borgarunum kunnandi tilfar um kommunusamanlegging og at halda kunnandi fundir.

Hetta er tað einasta, sum varð samtykt á fundinum í felagskommununi, vístu bygdaráðslimir í Sørvági á.

Tí kom tað eitt sindur óvart á teir, at hetta varð enda við tí, at bygdaráðið í Sandavági og í Miðvági høvdu samtykt at fólkaatkvøða skuldi vera í báðum bygdunum um kommunusamanlegging, tí tað var ikki hetta, sum tað var samtykt í felagskommununi at kommunalu umboðini hvør sær skuldi fara heim til sítt bygdaráð við.

Annars ivaðust bygdaráðslimir ikki í, at tað var tørvur á at upplýsa borgararnar um fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging og nevnt var, at tað kundi verið ein uppgáva hjá felags kommununi at seta eina nevnd at útvega kunnandi tilfar til borgaran á hesum øki.

Á bygdaráðsfundinum í gjár, var Eiley H. Weihe ikki á fundi.

Les eisini síðu 4.



**Aðalfundur hjá Føroya ProVita**

Í Emmaus í Klaksvík
leygardagin 24. nov. 2007, kl 10.00.

Á aðalfundinum leggur Anne-Lene Olofsson fyri við fyrilestri undir heitinum "Ambassasør for livet".

Síðan heldur aðalfundurin fram eftir skrá sambært viðtøkum felagsins.

Uppskot til nevndarvalevnir skulu vera Pro Vita í hendi innan 20 november.

*Øll eru hjartaliga vælkomin.*

KREA

føroya PROVITA
provita@provita.fo · www.provita.fo

